# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## 25 ára starvsdagur

18. feburar 2010 var tað 25 ár síðani Signheðin Davidsen var settur í starv á Føroya brandskúla. Hann byrjaði á Føroya brandsskúla føstulávintsmánadag 1985. Og var Tórfinn Hentze tá stjóri. Á sumri í 2001 tá táverandi stjóri fór úr starvi, varð Signheðin settur sum stjóri á Føroya Brandskúla. Hann var stjóri, til skúlin var lagdur undir Maskinmeistaraskúlan og seinni undir Vinnuháskúlan har Hans Johannis á Brúgv er stjóri. Signheðin er deildarleiðari á Trygdardeplinum við Áir, sum tað nú nevnist.

## 16 slóu tunnu í Stóru Dímun

Tey vóru væl mannað í Stóru Dímun henda leygardagin, tá tunnusláttur var á skránni í hesi minst búsettu oyggj okkara.

Tey vóru enntá so heppin, at sólin skein oman og niðan allan dagin, so tunnan bleiv málað úti í garði. Hendan leygardagin vóru tey heili 16 fólk á oynni.

Sambært heimasíðuni hjá Stóru Dímun, var tað Sproti, sum gjørdist kattakongur.

**sb.**



*Góð undirtøka til tunnuslátturin í Stóru Dímun*

*Mynd: storadimon.fo*

## Merkisdagar

**30 ára føðingardagur**



27. mars fyllir Ruborg Haraldsen, Saltangará, 30 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjókafeini kl. 19. Tey, ið ynskja at heilsa uppá Ruborg, kunnu tekna seg á tlf. 310826 ella 256345 áðrenn 23. mars.

**80 ára føðingardagur**

25. feb. verður Selma Heinesen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin á Brekku 16. Frá kl. 18.

**80 ára føðingardagur**

1. mars fyllur Henning Mortensen, Argjavegur 40, Argir, 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 28. feb. í AB-húsinum frá kl. 17.

**85 ára føðingardagur**

Mánadagin 1. mars verður Martin W. Tórgarð 85 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 28. feb. og tey, sum hava hug at heilsa uppá Martin, eru vælkomin inn á gólvið heima í Varðalág 3 ímillum kl. 14 og 17.

**Silvurbrúdleyp**

Týsdagin 23. mars hava Heidi og Jan Abrahamsen á Strondum silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**

Sunnudagin 28. feb. hava Oddvør og Kornelius Johannesen við Gjógv gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum við Gjógv leygardagin 27. feb. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**

Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

**Konfirmatión**

Dýra Biðidag 30. apríl 2010 konfirmerast Sára Kristiansen, dóttur Ib og Thyra Kristiansen, í Stubbæk kirkju. Adr. Buen 63 - 6200 Stubbæk - Tlf. 48415615 / 20645615 / 22215605

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Magnus Johan Larsen, Porkeri**, vanliga nevndur Manna andaðist sunnudagin á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, 85 ára gamal.

**Lars Martin Kristiansen, ættaður úr Sumba, búsitandi í Havn**, andaðist sunnudagin, 93 ára gamal. Kistan fer úr heiminum í Vallalíð mikudagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Lars kunnu lata Heiminum við Vallalíð eina gávu, konta í Føroya banka

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu við deyða og jarðarferð

**Jovinu E. Olsen**
Viðareiði

Tøkk til heimahjálpina, Sambýlið á Heygnum, Klaksvíkar Sjúkrahús, Hanus á Gørðum, prest, og tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til og fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Mildrid, Berghild, Mirjam og Olga v/familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Sofía Jacobsen**
(Fía í Skálum)
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Theodor Olsen, prest, fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur til Vestmanna Missiónshús.
Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina, kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til tykkum, sum bakaðu til ervið. Tøkk til bilførarar og heimahjálparar, sum hava verið um hana.
Hjartaliga tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Dánial, Sámal Jákup og Jóhanna**

## Dagurin

**23. februar. Papias**, deyður umleið ár 150. Var biskupur í Hierapolis í Frýgiu í Lítluásiu. Sigst at hava havt samband við ápostulin Filippus.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*